Føroya Studentaskúli og HF-skeið

# Vilt tú undirvísa í Hoydølum?

Føroya Studentaskúli og HF-skeið hevur 4-6 føst størv leys at søkja til lærarar, ið hava førleika at undirvísa í einari ella fleiri av hesum lærugreinum:

Alis-evnafrøði, alisfrøði, danskt, føroyskt, geografi, sálarfrøði, samfelagsfrøði, støddfrøði og søga.

Harumframt eru 15-20 ársvikar- og/ella tímalærarastørv leys at søkja til lærarar við førleika innan eina ella fleiri av hesum lærugreinum:

Danskt, enskt, evnafrøði, evning, franskt, føroyskt, ítróttur, religión, spanskt, støddfrøði, søga, tónleikur, týskt og vinnulívsbúskapur.

Nærri upplýsingar um størvini og um treytir, førleikakrøv, mannagongd v.m eru at finna á heimasíðu skúlans www.hoydalar.fo ella í netlýsingum á www.starv.fo og www.gymnasiejob.dk.

Umsókn tín skal vera skrivað á serligt oyðublað, ið tú finnur á heimasíðu skúlans.

Umsóknin skal sendast til:
Føroya Studentaskúli og HF-skeið,
att.: Mikkjal N. Helmsdal, rektari,
Hoydalar,
FO – 188 Hoyvík, Føroyar.
Ella t-post:
mikkjal.helmsdal@skulin.fo

Umsóknin skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. apríl 2010.






Røðari verður Bernardette Goulding, ið starvast hjá felagsskapinum Rachel´s Vineyard í Írlandi. Hon fekk sjálv fosturtøku framda og kennir pinuna, skommina, skuldarkensluna og sjálvfordømingina, ið henda gerð gevur.

- Við fosturtøku gevst eitt hjarta at sláa, og eitt annað brestur, sigur Bernardette Goulding.
- Tað er trupult hjá kvinnum, sum hava fingið fosturtøku framda, at syrgja sítt mista barn. Tá er einki lík, eingin jarðarferð, eingin grøv, eingir vinir og eingin familja at hjálpa tær at syrgja.
- Ein kvinna segði mær: "Hvussu kann eg syrgja eitt barn, hvørs lív eg havi endað? Tá eg valdi at fáa fosturtøku, gav eg tá ikki rættin til at syrgja frá mær?"
- Hesar kvinnur, sum hava valt fosturtøku, eru okkara døtur, konur, skyldfólk og vinir. Ov ofta bera tær eitt fjalt sár í hjartanum, sum opnast aftur, hvørja ferð tær hoyra eitt pinkubarn gráta, síggja eina kvinnu við barn ella hoyra fosturtøku nevnda.
- Ein og hvør fosturtøka er eitt andlát í familjuni. Aftan á andlát tørvar tær at syrgja. Við fosturtøku hevur tú ikki loyvi at syrgja.

*Øll áhugað eru vælkomin!*

føroya PROVITA

www.provita.fo



Á Høgabóli · 600 Saltangará · Tel 44 76 04 N. Finsensg. 18 · 100 Tórshavn · Tel 36 30 00





Thomas Dam búnýti


